## Fáa nú breiðband

Um stutta tíð fáa fólk í Hvannasundi og á Viðareiði breiðband. Føroya Tele er í ferð við at leggja fiburkaðal frá telefonstøðini í Klaksvík til Norðdepils. Kaðalin til Viðareiðis kann brúkast til breiðband, men fyrst má samband fáast millum Klaksvík og Norðdepli. Fiburkaðalin verður spulaður ígjøgnum rørini við vatni, skrivar Norðlýsið. Føroya Tele væntar, at arbeiðið við kaðalinum verður liðugt um ein mánað, um tað viðrar.

## Ikki misnýtast

Hóast uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum hevur gjørt av at leingja loyvið hjá amerikanska hervaldinum at flúgva ígjøgnum føroyskt loftrúm, eiga amerikanarar ikki at misnýta loyvið til ólógligan fangaflutning. Tað sigur løgmaður, sum vegna landsstýrið fer at boða donsku Ríkisumboðnum frá, at loyvið verður longt. Men uttanríkisráðið í Keypmannahavn fær samstundis at vita, at loyvið skal ikki brúkast til ólógligan fangaflutning.

# Høvdu Føroyar havt

**So kann eg bara ímynda mær, hvørja ávirkan tað hevði havt. Í mun til Danmark eru Føroyar fantastiska langt vekk frá øllum, men samstundis eru Føroyar í sjálvum sær fantastiskar, og tað mugu tit duga at selja. Tað sigur Søren Ejlersen millum annað, sum er útbúgvin kokkur men dagliga arbeiðir við íverksetan**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Søren Ejlersen var ein av teimum, sum hevði eitt upplegg til íverksetarakvøldið í Klaksvík mánadagin. Hann var biðin um at koma og greiða frá um íverksetan, um seg og sítt virksemi.

Sosialurin hitti mannin í gomlu løgreglustøðini í Klaksvík, sum nú eitur Íverksetarahúsið. Eitt hús har íverksetarar úr øllum Føroyum innan allar vinnugreinar kunnu koma og fáa persónliga vegleiðing, leiga sær eini høli ella luttaka á skeiðum í Íverksetarahúsinum.

– Eg havi arbeitt við innovatión, havi tilognað mær vitan og hættir gjøgnum mítt virksemi. Soleiðis fái eg nú gjørt fólk varug við, hvussu tey røkka sínum málum, sigur Søren Ejlersen.

Hann situr við krosskastaðum beinum, hálvavegna liggjandi í stólinum við einum kaffikrússi framman fyri sær, og okkara samrøða um lyklaorðið í allari íverksetan, innovatión, byrjar.

**Flyta seg í fremstu røð**

– Vit mugu skilja týdningin av at flyta seg í fremstu røð. Heimurin er vorðin eitt nógv minni handilsøki, og tí er tað avgerandi neyðugt, at pláss er fyri innovatión og menning, sigur Søren Ejlersen avgjørdur.

Tí er hann heldur ikki í iva um, tá hann verður spurdur eftir síni hugsan um Íverksetarahúsið í Klaksvík.

– Hugskotið hjá Rana (Nolsøe, blðm.) er rætt, sigur hann avgjørdur.

– Men her mugu allir partar við. Politikarar, vinnan og ikki minst øll tey innovativu høvdini, skulu vera við at skapa henda pallin til føroyskar íverksetarar, vísir Søren Ejlersen á.

**Stórir óbrúktir møguleikar**

Týdningarmikið fyri Føroyar er eisini, at tit megna at halda upp á tey fólkini, sum standa á odda fyri nýskapan og endurnýggjan.

– Tit mugu varðveita tey innovativu høvdini her. Tað er týdningarmikið fyri Føroyar. Mín fatan er eisini, at her eru nógvir óbrúktir møguleikar í landinum, heldur Søren Ejlersen.

Hetta er aðru ferð hann er í Føroyum og vitjar. Tí er tað eisini avmarkaðar eygleiðingar hann hevur gjørt av føroyska samfelagnum. Men Søren Ejlersen heldur seg tó kunna siga við vissu, at nærum øll føroysk eygu eru vend móti fiskinum, tá tað snýr seg um vinnu í Føroyum.

– Her mugu tit duga at flyta fokus. Og fyri tað minsta síggja aðrar og fleiri møguleikar í fiskinum, sigur hann.



**Visjónin er innovativ**

Orsaka av sínum avmarkaðu eygleiðingarmøguleikum í Føroyum, so fær Søren Ejlersen illa gjørt ítøkiligar viðmerkingar til viðurskiftini innan føroyska vinnu og politikk. Men tá hann kortini verður spurdur beinleiðis um føroyskan politikk og eitt evni, sum hevur fylgt nógv í okkara fjølmiðlum, nevniliga Visjón 2015, svarar Søren Ejlersen einfalt.

– Visjónin er innovativ í sær sjálvum, og tað er tørvur á innovatión her. Tí meti eg tað vera áhugavert at vera við at stuðla undir eini verkætlan sum hesari.

Hann er sannførdur um, at tað hevur týdning fyri eitt samfelag, at tað virðismetir og raðfestir innovatión. Søren Ejlersen sigur enntá, at tað kann hava eina beinleiðis negativa ávirkan á støðufesti hjá samfelgnum, um tað ikki verður gjørt pláss fyri innovatión.

**Finni eitt Føroyar brand**

Søren Ejlersen var sjálvur inni á evninum í áðni, men eg havi hug at tríva aftur í tað, nevniliga heimin sum eitt handilsøki, ið er vorðið nógv minni seinnu árini orsaka av altjóðagerðini.

– Danmark er ein partur av Evropeiska meginlandinum. Hjá okkum merkir fjarstøðan einki. Tað ger hon fyri so vítt heldur ikki í Føroyum, tí tað er ein sannroynd, at tað ber til hjá føroyingum at framleiða troyggjur í India gjøgnum altjóða netini sum eru, heldur fyrrverandi kokkurin.

Hann heldur eisini, at tað at Føroyar liggja so fjarskotið í mun til onnur lond, bæði kann og eigur at verða eitt av vørumerkjum okkara.

– Tit mugu finna eitt brand fyri Føroyar. Grønlendingar hava verið dugnaligir seinastu árini, at branda teirra vørur sum góðskuvørur. Millum annað við traceability (møguleikin at finna aftur til upprunan hjá vøruni, vita hvaðani hon stavar; blðm.), sigur Søren Ejlersen.

Hann nevnir so sum dømi, at tá føroyingar útflyta fisk, so er onki brand við.

– Tá fiskur verður útfluttur eigur eitt sindur um Føroyar altíð at fylgja við. Hvar er fiskurin fiskaður, hvør hevur fiskað hann, nær hann er fiskaður, og

**FAKTA**

Søren Ejlersen
Føddur í 1967
Útbúgvin kokkur
Grundleggjari av Aarstiderne.com
Næstformaður í nevndini fyri Aarstiderne A/S